Lóg fyri

J.nr.: 65/5 K 005

# B Y G D A S A V N

§ 1

Felagið Fornminnisfelagið í Nes kommunu, setur á stovn sjálvsognarstovnin Bygdasavnið í Nes kommunu.

§ 2

Endamálið hjá Bygdasavninum er í Nes kommunu:

1. at fremja varðveitingararbeiðið hjá fornminnisfelagnum í Nes kommunu, av fornminnum og forngripum,

2. at savna forngripir, merkja og skráseta teir við øllum upplýsingum, sum møguligir eru at fáa til vega,

3. at seta upp siðsøguligar framsýningar.

§ 3

Savnið verður stýrt av eini 5-7 manna nevnd, vald á aðalfundi í Fornminnisfelagnum í Nes kommunu.

Nevndin skipar seg sjálv, við formanni og næstformanni. Stovnurin verður bundin við undirskrift av nevndarformanninum. Til sølu og veðsetan av fastari ogn krevst einmælt nevndarsamtykt og undirskrift á viðkomandi skjøl, av nevndarformanni og einum nevndarlimi.

Nevndin stendur til svars fyri aðalfundi í Fornminnisfelagnum í Nes kommunu, og av ognum og rakstri hjá savninum.

Roknskaparárið er álmanakkaárið.

§ 4

Gevst savnið við virksemi sínum, verður farið fram eftir grein 3, stk. 3 í løgtingslóg nr. 17 av 9. mai 1972, við seinni broytingum, um bygdasøvn við mentunarsøguligum virksemi.

Soleiðis samtykt á stovnandi aðalfundi, hin 25. novembur 1995.

Góðkend:

Føroya Landsstýri, hin 17/10-1996

Sámal Pætur í Grund